ítróttur

Nr. 198 • mikudagur • 16. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# 12. maður bót fyri smugling



*Formaðurin í 12. manni varð ákærdur fyri smugling á flogvøllinum, tá føroysku viðhaldsfólkini byrjaðu týsku innrásina í Keypmannahavn*

**Pengar skuldu leggjast á borðið, tá fløgg, turrikløð og annað hjá føroyska 12. manni skuldi fáast ígjøgnum tollin í Kastrup**

TýSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*

**HANNOVER:** Føroysku fótbóltsáskoðararnir, tann sonevndi 12. maður, fingu óvæntaðar trupulleikar, tá teir mánadagin skuldu ígjøgnum tollin í Kastrup. Vanliga hava hesir hópin av ymsum skreytlutum við til áskoðararnar, tá farið verður til landsdyst, og hendan ferðin var einki undantak í so máta.

Regin Egholm, sum er formaður hjá áskoðarum, hevði saman við øðrum fingið hendur á einum viðførisvogni, tá allur førningurin skuldi førast til bussin, og sum vant, so varð gingið ígjøgnum grønu sonuna á flogvøllinum, men hetta skuldu tey kanska ikki havt gjørt.

– Ein tollari kom til mín og spurdi, hvat hetta var, sum vit høvdu við. Eg svaraði, at hetta vóru lutir, sum skuldu seljast til áskoðararnar á ferðini, men tá fall hamarin, byrjar Regin Egholm, tá hann skal greiða frá, hvat hendi.

– Tollarin segði tá við meg, at um talan var sølulutir, so skuldi tollur rindast, og hann kravdi at vita, akkurát, hvussu nógv vit høvdu av hvørjum, og hvat hetta skuldi seljast fyri. Vit royndu at greiða frá, hvussu stóð til við hesum, og at hetta ikki hevði verið nakar trupulleiki fyrr, men har var eingin bøn.

– Endin var so, at vit máttu gera eina uppteljing, og hóast vit royndu at undirdríva virðið á viðførinum heilt nógv, so endaði samanteljingin hjá tollvaldinum við, at vit skuldu rinda 11.000 kr., um viðførið skuldi við.

## Fingu bótina niður

– Vit søgdu, at hetta kom ikki upp á tal. At so fór alt retur til Føroyar, men hetta vildu teir ikki hoyra talan um. At teir bjóðaðu okkum at gjalda toll, var ein lin revsing sambært teimum, tí vit høvdu gjørt okkum beinleiðis sekar í smugling við at nýta grønu sonuna.

– Tíbetur vistu tey ikki so nógv um Føroyar, og vit søgdu við tey, at vit mest sum ongan danskan pening høvdu. Onkur kom við einum einstøkum føroyskum hundrað-krónu seðli, men hetta munaði sjálvandi lítið, og endin av øllum var so, at vit fingu tingað prísin niður á 5.000 krónur. Partur av hesum varð skaffaður á tann hátt, at ein, sum skuldi taka ímóti okkum á flogvøllinum, tók 2.000 kr. úr eini sjálvtøku, og so mátti hesin koma inn um tollin við pengunum.

– Til stuttleikar kann nevnast, at endaligi prísurin kom niður á 4.300, tí eftir at vit høvdu tingað prísin niður, vísti tað seg, at tollararnir ikki kundi taka ímóti 100 evrum, sum var ein partur av puljuni hjá okkum, og tí fingu vit hesar aftur, sigur Regin Egholm, sum leggur dent á, at hetta hevði hann ongan tíð verið úti fyri áður.

Hann vildi tó ikki fara so langt sum at siga, at hetta kom at merkja øktar prísir á turrikløðum og øðrum, men tað kendist í øllum førum heldur hugstoytt, at fyrstu túsundkrónuseðlarnir skuldu fara somikið illa á ferðini.

# Mugu vinna nærdystirnar

**Julian Johnsson var ikki nøgdur um føroyska miðvallarspælið í Litava, og hann ásannar, at teir mugu arbeiða harðari mikudagin, tá týskararnir eru á skránni**

TýSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*

**HANNOVER:** Tað er einki at ivast í, at ein av orsøkunum til, at Føroyar komu undir so stórt trýst í Kaunas, var, at spælið á føroyska miðvøllinum hekk alt ov illa saman.

Sum vant var sentrali miðvøllurin mannaður av Fróða Benjaminsen og Julian Johnsson. Eftir mánadagsvenjingina hjá landsliðnum fingu vit orð á Julian, og hann ásannaði alt fyri eitt, at hesin parturin av spælinum skuldi betrast, um eitt gott úrslit skal spyrjast burturúr í seinna dystinum.

– Stóri trupulleikin hjá okkum leygardagin var, at vit als ikki fingu fatur á mótstøðumonnunum. Vit nýttu tíðina til at renna aftan á teimum, heldur enn at møta teimum, og tá so er, so fáa vit trupulleikar. Hjá okkum ræður altíð um at vinna nakrar nærdystir á miðvøllinum, soleiðis at vit koma inn í dystin, og so kunnu vit hugsa um at spæla bóltin.

## Meira arbeiði

Spurdur, um ein orsøk kundi vera, at føroysku leikararnir ótilvitað hugsaðu meira um Týsklands-dystin enn dystin móti Litava, sigur Julian avgjørdur, at tað var tað ikki.

– Tað kunnu vit als ikki loyva okkum. Vit eru somikið lítlir, at vit skulu vera 100% til hvørja einastu uppgávu, og tað vóru vit eisini til dystin móti Litava, men vit bara ásanna, at tað ikki gekk so væl, sum vit ætlaðu, og hetta má so broytast til mikudagin. Og uppskriftin til hetta er heilt einfalt, at vit mugu arbeiða harðari, helt Julian Johnsson at enda.



*Hjá okkum ræður altíð um at vinna nakrar nærdystir á miðvøllinum, soleiðis at vit koma inn í dystin, og so kunnu vit hugsa um at spæla bóltin, sigur Julian Johnsson, nú landsliðið fyrireikar seg til Týsklands-dystin*



# Føroysk innrás í Hannover

**Mánakvøldið byrjaði føroyska innrásin í Hannover av álvara, tá tveir bussar við í alt 140 fólkum komu á staðið, og roknast kann við nógv fleiri vitjanum komandi dagarnar**

*Kom bara an Týskland. Føroyski 12. maðurin er klárur at gera innrás í Hannover, og lítið er at ivast í, at einir hálvt túsund føroyskir fótbóltsáskoðarar ætla sær at seta dám á býin hesar dagarnar*



TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

**HANNOVER:** Hvítu og bláu litirnir hjá føroyska fótbóltslandsliðnum fara eftir øllum at døma at síggjast aftur í gøtunum í Hannover, nú landsdysturin móti Týsklandi av álvara er farin at nærkast.

Sum vit nevndu í blaðnum í gjár, so hevur Atlantic longu sent ein flúgvara við áskoðarum afturat teimum, sum eisini vóru við í Litava, og nú er av álvara farið at leggjast afturat hesum bólki.

Mánakvøldið komu tveir bussar við áskoðarum hjá 12. manni til Pelikan Viertal, sum er bústaðurin komandi dagarnar, og so er væntandi, at aðrir bussar koma so við og við.

Í hesum fyrsta ferðalagnum vóru eini 140 fólk, og harumframt hevur 12. maður ein buss við 70 fólkum afturat, sum leggjast afturat mikudagin. Hartil skulu so leggjast bussar, sum koma ymsa aðra staðni úr Danmark, so lítið er at ivast í, at hetta er nakað, sum fer at seta dám á býarmyndina komandi dagarnar.

## Skjótt rundan túr

Sjey tíma langi busstúrurin úr Keypmannahavn tóktist ikki at bila stórvegis, tá mongu áskoðararnir komu til bussin. Lagið var av tí allarbesta, og longu eftir at gestirnir høvdu fingið leitað sær ymsu kømrini fram, var móttøkuhøllin á gistingarhúsinum um at vera á tremur við føroyskum áskoðarum.

Ein teirra var sjávlandi formaðurin í 12. manni, Regin Egholm, og hann má eftir hondini sigast at vera ein royndur harri í so máta.

– Eg veit ikki akkurát, hvussu ofta eg havi verið við. Eg haldi hetta er 17. ella 18. ferðin, men eg eri ikki heilt vísur, sigur hann, tá vit spyrja, hvussu ofta hann nú hevur verið partur av landsliðsferðini hjá Føroyum.

Spurdur, um hetta kanska er tann dysturin, sum hann fer til við størsta spenninginum, sigur hann, at tað kanska er bæði og.

– Eg eri sjálvandi ræðuliga spentur, men nú vit sjálvir hava skipað fyri ferðunum seinnu árini, er alt vorðið eitt sindur meira øðrvísi hjá mær. Tað er jú so nógv annað, sum hugsast skal um, og tí eri eg enn ikki av álvara farin at hugsa um dystin. Sum dømi um munin millum túrarnar nú, og so teir fyrstu, sum eg var við, kann sigast, at enn havi eg ikki fingið fyrstu ølina niðurum.

## Væl fyrireikaðir

Og at nógv er væl og virðiliga fyrireika, tykist lítil ivi at vera um. Eitt nú er tað umráðandi hjá áskoðarum, at tey búgva nær saman, og í Pelikan Viertel eru so øll savnaði á einum stað.

Okkurt skulu fólkini eisini gera í Hannover, og týsdagin varð skipað fyri einum túri í eitt stórt tivoli nærhendis, umframt at ein bowlinghøll - við ikki færri enn 20 banum - varð bíløgd øll sum hon var.

Á sjálvum dystardegnum fer fyrireikingin fram í Brauhaus, sum er ein stór barr her í Hannover. Her er rúm fyri einum 1.000 fólkum, og 12. maður hevur gjørt avtalu um at leiga einir 300-400 av hesum, so at allir føroysku fótbóltsáskoðararnir kunnu savnast her, áðrenn farið verður til dystin.

Her verður so andlitsmáling, søla av skreytlutum, syngjan av slagsangum og alt tað, sum hoyrir einari veruligari upphiting til, so lagið á áskoðarunum skuldi í øllum førum verið í topp, tá tey seinni á kvøldi fara til dystin.

Hósdagin um middagsleitið verður so farið aftur til Keypmannahavnar, har Jackways hevur játtað at hava opið um kvøldið, so alt í alt má sigast, at áskoðararnir hava nóg mikið at taka sær til á drúgvu ferðini. So er bara at vóna, at úrslitið í dystinum eisini verður nøktandi.

Hvussu var og ikki, so var lagið óført, tá tykkara útsendu vitjaðu mánakvøldið, og longu eftir einum knøppum tíma vóru trummurnar fingnar til vega. Føroysku slagsangirnir rungaðu í stóra bygninginum, so fyri gestirnar á staðnum, mundi tað verða so sum so við náttarfriðinum, men tað tóktist okkara 12. maður ikki at geva sær stórvegis far um.



*Fólkini í Pelikan Viertel høvdu úr at gera mánakvøldið, tá tveir bussar við 140 føroyskum viðhaldsfólkum komu á staðið, men skjótt varð borið at, tá kømurini vóru komin í rættlag, varð alt fyri eitt farið undir upphitingina til dystin*

